# Vælkomin á Summar Festival

Í døgunum frá 12. til 15. august verður fyri fyrstu ferð Summar Festivalur í Klaksvík. Hetta er ivaleyst størsta tónleikatiltak, sum nakrantíð hevur verið í Norðoyggjum, og tónleikurin fer at ljóma í fýra samfullar dagar. Tað verður ein ørgrynna av tónleiki á skránni - nógv gott føroyskt og ymiskt spennandi út útlandinum - og vónandi fáa allir norðoyingar, eins og gestir úr øllum Føroyum, eina góða og minniliga uppliving saman við vinum, familju og kenningum eitt langt og gott vikuskifti her á staðnum.

Fasta sambandið millum Norðoyggjar og meginøkið nærkast alsamt, og Summar Festivalurin kann frøðast um, at tað gerst lættari hjá fólki at koma til Klaksvíkar í framtíðini. Umráðandi er, at Norðoyggjar eisini vilja bjóða seg fram við spennandi mentanartiltøkum, og hetta er ein roynd at gera nakað nýtt, sum allir føroyingar vónandi fáa gleði av. Tí vóna vit eisini, at øll familjan fer av húsum fyri at uppliva teir frálíku bólkar og solistar, sum vit kunnu bjóða fram longu á palli. Her er nógv ymist at fara til, og øll eiga at finna okkurt, sum teimum dámar.

Tað hevur í fleiri ár verið ein tanki at skipa fyri einum festivali í Klaksvík. Fyri nøkrum árum síðani var ætlanin at hava hetta tiltakið Úti í Grøv, men tað var ikki hildið at vera ráðiligt. Síðani lá hugskotið í dvala eina tíð, men tað var ongantíð gloymt, og fyri góðum ári síðani vóru fyrstu tankarnir um ein festival í miðbýnum í Klaksvík kveiktir.

Havandi í huga at tað er eitt stórt arbeiði og váði í at fara í holt við eitt tiltak av slíkum slag, so hevur tað eisini verið ein sonn fragd at skipa fyri Summar Festivalinum og uppliva, hvussu góð undirtøkan hevur verið, og hvussu stóran áhugin borgarar í býnum og tónleikarar nær og fjar hava havt fyri tiltakinum.

Klaksvíkar Kommuna var fyrst at stuðla undir tiltakinum og tað hevði alt at siga! »Vit eru við, farið í gongd«, vóru boðini frá kommununii, og soleiðis hevur tað verið frá byrjan til dagin í dag.

Høvuðsstuðulin Norðoya Sparikassi eigur saman við sponsorum og stuðlum annars eisini sín stóra part av æruni, at Klaksvík næstu dagarnar fer at royna at liva upp til heitið sum Tónleikans høvuðsstaður.

Tað hava verið og eru nógv góð fólk við í arbeiðnum at skipa fyri festivalinum, og tað er hugaligt, at fólk eru so beinasom og positiv mótvegis hesum tiltakinum. Ein arbeiðsbólkur hevur samskipað fyrireikingarnar, og hesin bólkur vil við hesum fáum orðum takka øllum, sum hava gjørt Summar Festivalin til veruleika. Nú fara vit at lata tónleikin tala og veðurgudarnar ráða. Gott vikuskiftið og góðan festival øll somul!

**Steintór Rasmussen**
**Erik Biskopstø**
**Tummas Pauli Mýri**
**Eyðun Klakstein**

# Ferðaskald á lívsins skuggasíðu

**HANS INGE FAGERVIK**

**Hans Inge Fagervik er royndi maðurin, sum við rødd og ljóðføri hevur verið á ferð í 32 ár. Sum yrkjari og tónaskald er hann tikin úr leikum og er høgt í metum. Virksemið á pápírinum, á palli og í gerandisdegnum snýr seg tó í stóran mun um at berjast ímóti rúsevnismisnýtslu og maðurin, sum yrkti sangin "Marita", er ofta at finna á gøtuni millum tey, sum ferðast á lívsins skuggasíðu**



**Hans Inge Fagervik er mest kendur fyri sangin um Mariu, sum vit eisini kenna á føroyskum. Søgan um Mariu og hennara rúsevnismisnýtslu er ein sonn søga**

Søgan handan sangin »Marita« er sonn. Vit kenna hann á føroyskum, har Kim Hansen syngur um Mariu og syrgiligu rúsevnislagnu hennara.

Hans Inge Fagervik eigur sangin Marita, og sangurin er ikki íspunnin, men er úr veruleikanum.

Hans Inge Fagervik er maður, ið vil nakað. Hann vil skriva sínar sangir og síni løg. Hann vil framføra tey á palli, men umframt, so hevur hann eitt hjartamál, og tað er bardagin ímóti rúsevnismisnýtslu.

Troubadoururin úr Noreg er millum hægst mettu tóna- og orðasmiðir í heimlandi sínum. Men hetta tekur ikki Hans Inge Fagervik av fótum. Hann missir ikki jarðarsambandið. Tá hann er á tónleikaferð, so er ikki altíð, at hann er at finna, har ein skuldi hildið, at hann helt til. Tað er hinvegin gerandiskostur at finna tónaskaldið á gøtuni millum misnýtarar og á hitastovum, har fólk á skuggasíðu lívsins kenna ein fløva og har hjarta- og húsrúm er fyri teimum. Har fólk hava stundir til teirra og vísa teimum ans.

## VERKÆTLAN

Og júst sangurin »Marita« er úr hesum kalda veruleika. Hans Inge kendi ungu gentuna, nevnd Marita, sum vøkur og evnarík sakk longur og longur í misnýtsluna, til feigdardagin, tá deyðsboðini at enda frættust.

Hans Inge Fagervik hevur eina verkætlan, har hann vitjar skúlar. Í »Rock mot Rus« verkætlan síni, kemur hann í samband við ungfólk, bæði í Noreg, men eisini í grannalondunum.

- Fyri stuttum hevði eg konsert fyri 500 næmingum og eg legði til merkis eina gentu, ið táraði. Vit hugdu hvør í eyguni á øðrum og hon hugdi beint í eygu míni, meðan eg sang. Tá konsertin var liðug, fór eg yvir til hennara fyri at tosa við hana. Eg spurdi, um hon hevði brúk fyri at tosa við onkran og spurdi, um hon fekk hjálp. Jú, hon fekk ta hjálp, ið hon skuldi hava. Men støðan var tann, at mamma hennara var deyð av ovurnýtslu av rúsevnum eina viku innan konsertina, greiðir Hans Inge Fagervik frá.

Um Rock mot Rus konsertirnar sigur hann:

- Konsertirnar eru ikki bara fyribyrgjandi, men innihalda eisini ein positivitet og eini boð um gleðina við at liva, og tað er umráðandi at duga at liva og at finna gleðina við lívinum, sigur Hans Inge Fagervik.

## GLEÐIR SEG

Hans Inge Fagervik hevur vitjað í Føroyum 3 ferðir áður, men hann fegnast um, at hann aftur fær møguleikan at vitja oyggjarnar, ið hava henda hugtakandi grøna litin, sum hann tekur til.

Um sangir sínar sum heild sigur hann, at teir eru samfelagsrevsandi og at tekstirnir eru um næstrakærleika, men annars metir tónaskaldið, at tað er umráðandi at liva í tíðini.

– Men annars kann sigast, at talan er um »det nære og kjære«, sigur Hans Inge Fagervik, sum verður roknaður sum fjøltáttað skald.

Hann hevur verið á tónleikaferð síni í 32 ár og hevur útgivið eini 25 fløgur. Hjá okkum er sangurin Maria best kendur. Einar Olsen føroyskaði við kønari hond og Kim Hansen syngur so meistarliga.

Við sær á Summarfestivalinum í Klaksvík hevur Hans Inge Fagervik dugnaligan norskan tónleikara, ið leikar fleiri ljóðføri, og umframt fara føroyskir tónleikarar at leika við honum.

Hans Inge Fagervik fegnast um, at føroyingar kenna løg hjá honum og var bilsin og fegin, tá hann fann útav, at føroyingar duga og skilja so væl norskt og at eitt lag hjá honum er týtt til føroyskt.

# Summar Festivalur 2004

### Hósdagur 12. august

| | |
|---|---|
| Kl. 21.00 | Konsert við Pætur við Keldu í Atlantis |

### Fríggjadagur 13. august

| | |
|---|---|
| Kl. 21.00 | Workshop við Ken Hensley (UK) í Atlantis |
| Kl. 23.30-04.00 | Konsert og dansur í KÍ-høllini: Gunnar Mikkelsen (DK), Terji Rasmussen og DJ Cool. |

### Leygardagur 14. august

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00-12.00 | Norðoya Sparikassi bjóðar til morgunmatarborð í miðbýnum. Tónleikur verður at hoyra av Sparikassapallinum. |
| Kl. 15.00-00.30 | Stór útikonsert í miðbýnum. Við Ken Hensley (UK), Boney M (D), Frændur, Hjarnar, Guðrun Sólju Jacobsen, Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags og nógvum øðrum spennandi nøvnum. Sí nærri skrá aðrastaðni á síðuni |
| Kl. 00.30-04.00 | Dansur í KÍ-høllini: Showmenn, Elton John Jam og DJ Cool. |

### Sunnudagur 15. august

| | |
|---|---|
| Kl. 20.30 | Gospelkonsert í KÍ-høllini: Kjell Samuelson (SE), Hans Inge Fagervik (NO), Torkil Mørkøre og Sigrid Rasmussen & Gunnar Guttesen. |

### Skrá fyri Útikonsertina leygardagin 14. august

Bólkarnir spæla á tveimum pallum. Á tí stóra pallinum á Vágsbøi og á tí hugnliga Sparikassapallinum, sum stendur á økinum uttanfyri Norðoya Sparikassa.

**Vágsbøur**

| | |
|---|---|
| Kl. 15.00 | Trølla Pætur og Angela |
| Kl. 15.45 | Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri setir Summar Festivalin |
| Kl. 16.00 | Credo |
| Kl. 17.00 | Týr |
| Kl. 18.15 | Hjarnar |
| Kl. 19.30 | Frændur |
| Kl. 21.00 | Ken Hensley (UK) |
| Kl. 22.30 | Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags |
| Kl. 23.30 | Boney M (D) |

**Sparikassapallurin**

| | |
|---|---|
| Kl. 16.30 | Brandur Enni |
| Kl. 17.45 | Petsi Tvørfoss |
| Kl. 19.00 | Guðrun Sólja Jacobsen |
| Kl. 20.20 | Hanus G. Johansen |
| Kl. 22.00 | Johan í Kollafirði |

**Heimasíða við upplýsingum og tíðindum: www.summarfestivalur.fo**

## Dúgvan siglir eykatúrar

Dúgvan siglir eykatúr í sambandi við stóru útikonsertina á Summar Festivalinum leygarkvøldið 14. august. Ein løtu eftir at konsertin er liðug, fer Dúgvan av Klaksvík til Leirvíkar. Túrurin verður kl. 01:15. Bussamband verður úr Leirvík til Havnar og bygdir í Eysturoynni.

Sunnudagin í sambandi við gospelkonsertina verður seinasti túrurin hjá Dúgvuni av Klaksvík fluttur til kl. 23.00, so at øll fólk, sum skulu úr Klaksvík eftir konsertina, sleppa tað.

